# Fólkavøkstur gevur búskaparvøkstur



**Tað skal vera so freistandi at búgva í Føroyum, at man ikki kann siga nei til at flyta til Føroyar. Mítt aðalmál er, at í 2020 hava vit 75.000 íbúgvar í Føroyum**

ANNIKA OLSEN
*Fólkaflokkurin*
*www.annikaolsen.net*

Tað er neyðugt, at vit taka vantandi fólkavøksturin í Føroyum í djúpasta álvara. Um vit ikki fáa fólkatalið upp, hava vit onki grundarlag fyri búskaparvøkstri og harvið menning av okkara samfelag, og tað er ein vanlagna. Umframt at tað eru 22.000 føroyingar búsitandi í Danmark, sum ikki flyta heim aftur, so sær tað heldur ikki út til, at føroyingar føða fleiri børn enn áður. Í Tórshavnar kommunu hevur talið av føðslum ligið um 300 um árið, meðan hetta talið í fjør fór niður á 256 føðslar, hetta eru ikki góð útlit. Orsøkirnar kunnu vera so mangar, men ein sannroynd er, at tað er dýrt at búgva í Havn, og tað kann halda familjum aftur at fáa sær barn nummar 2 ella 3. Tí avgjørdu vit á seinasta býráðsfundi fyri jól at hækka systkinaavsláttirin úr 25% upp í 75%. Hetta skuldi hjálpt hartraktu barnafamiljuni og møguliga givið øðrum familjum fíggjarligt rásarúm til at fáa sær eitt barn aftrat.

**Tað skal vera freistandi at flyta aftur til Føroyar**

Fyri at fáa føroyingar uttanlands og onnur at flyta heim til Føroyar mugu vit gera tað freistandi og spennandi at búgva í Føroyum. Fólk í dag seta krøv og velja tískil neyvan at flyta til Føroyar av reinari nostalgi. Tað eru 89 læknar, 54 løgfrøðingar og 83 útbúnir føroyingar innan vinnulív og leiðslu í Danmark. Hetta er serfrøði, vit hava tørv á í Føroyum, og hava vit ikki ráð til at lata standa til. Her eiga vit at skapa karmar fyri einum spennandi vinnulívi og arbeiðsumhvørvi, har tað fíggarliga lønar seg at flyta heim. Tann størsti bólkurin av føroyingum, ið eru búsitandi í Danmark, eru fólk, ið starvast innan tað almenna; 334 sjúkrarøktarfrøðingar, 371 námsfrøðingar, 227 lærarar og 685 heilsuhjálparar. Tað skulu ikki nógvar kanningar til at rokna út, hví hesin bólkurin er so stórur. Lønin í nevndu bólkum er hægri í Danmark enn í Føroyum, umframt at livikostnaðurin í Danmark er lægri. Hetta kunnu vera orsøkir til, at hesir føroyingar ikki halda, at tað lønar seg at flyta heim aftur.

Umframt at tað fíggjarliga skal løna seg at búgva í Føroyum, mugu vit føra ein góðan starvsfólkapolitik, har trívnaður og førleikamenning eru lyklaorð. Hartil skulu vit styrkja um mentanarlívið, býarlívið og frítíðarlívið, sum eisini er neyðugt fyri tann sosiala trivnaðin. Velur man at arbeiða uttanlands, men búgva í Føroyum, so skal man hava møguleika fyri at draga meginpartin av ferðaútreiðslunum frá í skatti, um man er skattskyldug/ur í Føroyum. Vit mugu seta ferð á vinnulívið, vitanina og vælferðina, soleiðis at vit kunna økja um fólkatalið í Føroyum og harvið skapa gróðrarlíkindi fyri búskaparvøkstri og samfelagsmenning.



# Sølan av rúsdrekka er munandi økt

**Rúsdrekkasølan boðar frá, at sølan í Føroyum var munandi økt seinasta árið, bæði í nøgd og krónum**

JASPUR LANGGAARD
*Miðsflokkurin*

Eg upplivdi, sum aðalskrivari hjá Bláa Krossi, eitt politiskt ynski um eina meira frísinnaða skipan, tá ið talan er um sølu av rúsdrekka. Kann nevna millum annað skeinking á festivalum, sølu av rúsdrekka umborð á Smyrli og uttandura sølu av rúsdrekka.

Tað er sjálvandi ilt at siga, hvat orsøkin er til hesa øking. WHO er ein felagsskapur, sum granskar nógv innan hetta økið, og teir hava staðfest, at atkomuligheit er ein týðandi faktorur fyri nøgdina av rúsdrekka sum verður drukkin.

WHO staðfestir somuleiðis, at ein greiður samanhangur er millum litur pr. íbúgva og hvussu nógvar samfelagsligar skaðar standast av rúsdrekka.

- Rúsdrekka relateraðir trupulleikar kosta danska statinum 6 til 10 mia. árliga.
- Í Danmark eru 3000 deyðsfall árliga har rúsdrekka er ein partur av orsøkini – beinleiðis ella óbeinleiðis.
- Helvtin av teimum í Danmark, sum misnýtslan rakar, eru undir 30 ár.

*Kelda: www.sundhedsstyrelsen.dk*

Tað er ilt at meta um, hvussu støðan verður um 10 ár, um henda frísinnaða kósin heldur fram. Persónliga vil eg arbeiða fyri, at hetta ikki hendir, um eg kann gera mína ávirkan galdandi, har hesi viðurskifti verða løggivin.



Hanna heldur

# At nýhugsan innan vinnulívið skal fjálgast

HANNA JENSEN
*Fólkaflokkurin*

Vit hava eina stóra høvuðsvinnu í fiskivinnuni og tá tað kemur til vinnulív, liggur parturin hjá Eysturoynni ikki eftir. Okkum tørvar framhaldandi at byggja upp aðrar vinnur afturat fiskivinnuni, samstundis sum vit effektivisera og nútímansgera hana – eisini við atliti at umhvørvi. Ferðavinnan er ein vinna undir uppbygging, men føroyingar eru skapandi fólkaslag, og teir røttu karmarnir, tann rætti stuðulin og tær røttu visiónirnar høvdu skjótt sett ferð á onnur nýggj frambrot eisini. Sum dømi kunnu nevnast KT-vinna, tónleikavinna og vinna knýtt at sniðgeving og list. Og tað er alneyðugt, fyri at vit kunnu fáa størri inntøkur til landið, fyri at fáa størri javnvág í okkara vinnulív og framhaldandi fáa okkara fólk at trívast í landinum – eisini í Eysturoynni.

**Vel tí heldur Honnu**

*http://hanna.folkaflokkurin.fo og*
*http://homepage.mac.com/hannajensen*
*http://www.dimma.fo/Bloggan/hanna.jensen/*



# Landshúsarhaldið er sum øll onnur húsarhald

HELGI ABRAHAMSEN
*Sambandsflokkurin*

Landshúsarhaldið virkar sum eitt vanligt húsarhald. Tað kann vera líkamikið hvussu nógvar rokningar ein kona sendir til mannin, ella maðurin sendir til konuna í einum húsarhaldi. Tað sum tey liva av, eru ikki peningaflytingar úr einum lumma í annan innanfyri teirra fýra veggir, men tey liva av inntøkum, sum tey forvinna uttanfyri teirra egna heim. Tað eru pengarnir sum koma inn í húsarhaldið, sum eru avgerandi fyri, hvussu stór keypiorkan er.

Men so mugu tey sjálvsagt eisini ansa eftir, at tað sum tey keypa ikki kostar meira enn tey klára at gjalda. Eisini mugu tey hugsa seg um, hvussu tey brúka pengarnar. Skulu tey til dømis gloyma tey gomlu og sjúku í familjuni, og heldur brúka pengarnar til luksusvørur?

Soleiðis er eisini í landshúsarhaldinum. Sum samfelag liva vit av tí, sum vit forvinna úr útheiminum, og ikki av rokningum sum vit senda til hvønn annan innanfyri landoddarnar. Men í løtuni hava vit eitt stórt undirskot á handilsjavnanum. Hetta merkir, at føroyska húsarhaldið keypir fyri meira enn tað selur fyri. Tað ger kanska ikki so nógv í eitt styttri tíðarskeið, men í longdini kunnu vit ikki liva soleiðis. Eisini hava vit líndi til at gloyma tey sjúku og veiku í okkara felags húsarhaldi, og brúka ístaðin pengarnar til ymiskt marglæti.

Stóru avbjóðingarnar í komandi tíðum verða tí at økja um útflutningsvirðið (millum annað við at betra um marknaðaratgongdina), og vit mugu eisini raðfesta tey bleytu virðini fram um óneyðugt luksus.

– Og so ikki at gloyma: - Vit mugu siga nei til ta kostnaðarmiklu fullveldisætlanina!



# Hesum standi eg fyri

RANDI Í JÓGVANSSTOVU
Sambandsflokkurin

- Nei til at avtaka rentustuðul til egnan bústað
- Barnsburðarfarloyvið leingjast upp í eitt ár – 3 mánaðir til pápan
- Stakir uppihaldarar skulu hava barnaískoyti og dupultan lestrarstuðul
- Lønarendurgjald til tímalønt foreldur fyri barnins fyrsta sjúkradag
- Bústaðarpakkin leggjast fram aftur og víðkast við bygging av leiguíbúðum
- Rættindi og virkismøguleikar hjá førleikatarnaðum skulu tryggjast
- Eldrarøktin fleiri hendur – tørvurin á røktarbúplássum nøktaður í 2010